Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	04.11.2025
Mál nr.:	25/12862-11
Málsviðgjørt:	BÁT
Ummælistíð:	12.09.2025- 03.10.2025
Eftirkannað:	15.10.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
(Ábyrgdin av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommununar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 15. desember 2014, løgtingslóg nr. 62 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 70 frá 25. mai 2020 og § 9 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Kommununar veita heimabúgvandi fólkapensjónisti og borgara við demenssjúku tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at viðkomandi kann búgva í egnum heimi sum longst."

2. § 10 a, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Kommununar veita endurvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist og borgara við demenssjúku, ið vegna mistan førleika hevur tørv á endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at viðkomandi:
1) kann búgva heima sum longst, og
2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi."

3. § 10 b, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Kommununar veita viðlíkahaldsvenjing til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna ellisbrek ella sjúku hevur týðandi ella varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin viðkomandi er, og til borgara við demenssjúku."

4. § 10 b, stk. 2 verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi

virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar, soleiðis at borgarin:
1) kann búgva heima sum longst, og
2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.”

5. § 13, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“Kommunurnar kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar og borgarar við demenssjúku.”

6. § 14, stk. 1 verður orðað soleiðis:

“Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku og borgarum við demenssjúku, sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Síðani eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita, hevur ofta verið frammi, at fólk undir fólkapensjónsaldur við demenssjúku detta niður ímillum skipanir – millum land og kommunur. Mett verður, at tað er betri fyri borgaran, um tænastan er samlað á einum stað. Almanna- og mentamálaráðið hevur fingið áheitanir frá avvarðandi og Alzheimerfelagnum um at savna tænastuna til fólk við demenssjúku, umframt at løgtingsfólk hava gjørt vart við trupulleikan og sett landsstýrisfólkinum skrivligar fyrispurningar um evnið. Almanna- og mentamálaráðið hevur síðani tikið tað upp við kommunurnar um at skipa økið hjá teimum. Tí verður hetta uppskotið lagt fram.

1.2. Galdandi lóggáva

Í 2015 varð eldrarøktin løgd til kommunurnar at umsita. Í sambandi við útleggingina vórðu bæði starvsfólkaorka og fysisku karmarnir løgd til kommunurnar. Síðani íkomu nakrar støður, har ósemja varð um, hvør hevði ábyrgdina av at veita fólki við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur tænastu. Hesar ósemjur blivu lagdar fyri Markamótsnevndina, sum tók avgerð um, at ábyrgdin av at veita dagtilboð og umlætting til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur lá hjá landinum og ábyrgdin av at veita búpláss til henda málbólk, lá hjá kommununum. Eftir at Markamótsnevndin tók hesar avgerðir, varð játtan fingin til vegar á fíggjarlógini at lyfta hesa uppgávu.

Í dag er tað tí soleiðis, at búpláss til fólk við demenssjúku verður skipað í kommunala geiranum, meðan dagtilboð og umlætting til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur verður skipað hjá landinum. Hóast Markamótsnevndin hevur tikið avgerð um hetta býtið, vísir tað seg, at tað enn eru fólk, sum detta niður ímillum ella sum ikki verða loftaði av teimum skipanum, sum eru.

Demensklinikkin hevur upplýst Almannaverkinum í mai 2025, at tá høvdu 19 fólk undir fólkapensjónsaldur tilknýti til demensklinikkina. Harumframt búgva 6 fólk undir fólkapensjónsaldur á kommunalum røktarheimi.

Almannaverkið hevur dagtilboð við 16 plássum, 8 í Tórshavn og 8 á Glyvrum. Tó verða hesi ikki brúkt í nóg stóran mun, tá ið tað bert eru 5 fólk, harav bert 2, sum koma undir sjúkuna progressivt degenererandi (sjúka sum stendur við og versnar) demens, sum fáa dagtilboð. Almannaverkið hevur upplýst, at fólk við demenssjúku koma sum er ikki í tey tilboð, sum landið skipar, fyrr enn sjúkan veruliga hevur tikið dik á seg.

Almannaverkið kemur lutfalsliga seint í samband við hesar borgarar og teirra avvarðandi í mun til at veita tænastu. Royndirnar vísa eisini, at tá tørvur er á umlætting, er ikki long tíð til, at hesir borgarar eru so mikið illa fyri, at tørvur er á búplássi.

Hagtøl hjá Almannaverkinum vísa, at tað ongantíð eru meir enn 1-3 borgarar, sum tørva umlætting í senn. Av tí at talið er so lágt, hevur Almannaverkið avgjørt ikki at skipa umlætting til henda bólk, men keypir umlætting frá kommunum. Eisini verður mett skilagott at nýta umlættingina sum ein part av tilvenjing til búpláss.

Ansingarsamsýning
Rættarstøðan viðvíkjandi ansingarsamsýningini er tann, at kommunurnar kunnu taka avgerð um at veita fólki samsýning, sum átaka sær at ansa einum persóni við varandi sjúku, ið er í menning og gongur afturá, og sum hevur tørv á hjálp og røkt alt samdøgrið. Sostatt eru borgarar, undir fólkapensjónsaldur, við demenssjúku longu fevndir av ásetingini um ansingarsamsýning.

Tænasturnar, sum Almannaverkið veitir í dag
Almannaverkið veitir ymiskar tænastur til borgarar við demenssjúku, sum eru yngri enn fólkapensjónsaldur. Tað snýr seg bæði um ráðgeving og tænastur.

Uppihaldsgrundarlag og veitingar
Fyrsta kontaktin við borgaran snýr seg sum oftast um uppihaldsgrundarlagið. Annaðhvørt hevur borgarin mist sítt arbeiði/sína arbeiðsinntøku ella er í vanda fyri at missa sítt arbeiði/arbeiðsinntøku. Peningaligar veitingar verða veittar eftir lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk og almannapensjónslógini.
Tá fólk hava nakað av arbeiðsevnum, verður ráðgeving og vegleiðing veitt um fyriskipanina **tillagað starv,** t.d. at hjálpa við at útfylla umsóknarblað og at søkja ráðgeving og vegleiðing frá deildini Arbeiðsbúgving. Talan hevur tá verið um, at tann demensrakti heldur fram hjá sama arbeiðsgevara, sum áðrenn sjúkan rakti. Møguligt er eisini at koma í fyriskipan við avtalaðari løn. Mest vanligt er, at yngri við demenssjúku ikki eru á arbeiðsmarknaðinum, men fáa veitingar eftir almannapensjónslógini. Í øðrum lagi ráðgevur og vegleiðir samskiparin um møguleikan at søkja um **fyritíðarpensjón** og eisini **hjálpar- og røktarviðbót**, ið valdast á hvørjum stigi, demenssjúkan er á, evt. hjálpir við at útfylla umsóknarblað og at søkja ráðgeving og vegleiðing frá deildini Arbeiðsbúgving.

Tryggingar og fulltrú
Tað er vanlig mannagongd, at samskiparin ráðgevur og vegleiðir um evt. rætt til **tryggingarveitingar** umframt tørvinum á at fáa **fulltrú** til avvarðandi at umsita fíggjarlig viðurskiftir hjá tí demenssjúka borgaranum.

Heimahjálp/eldraøkið
Tað er vanlig manngongd, at samskiparin í samráð við fakliga kontaktpersónin (frá dagtilboðnum) ráðgevur og vegleiðir yvirskipað um møguleikar við **heimahjálp**, vísir til viðkomandi kommunu hesum viðvíkjandi, evt. sendir fráboðan/áheitan til avvarðandi kommunu um tørvin á heimahjálp.

Uppfylging
So hvørt sum demenssjúkan versnar, og tørvurin hjá tí demenssjúka økist, er vanlig mannagongd, at samskiparin og fakligur kontaktpersónur skipar fyri **uppfylging í málinum**, har avvarðandi kommuna eisini er boðin við til fundin, ofta á dagtilhaldinum, saman við avvarðandi hjá tí demenssjúka, m.a. fyri at gera vart við tørvin á umlætting, búplássi o.a.

Hjálpartól
Tað er vanlig manngongd, at samskiparin ráðgevur og vegleiðir yvirskipað um møguleikar við **hjálpartólum**, hjálpir teimum við at útfylla umsóknarbløð og at søkja ráð og vegleiðing frá deildini Hjálpartól. Terapeutar veita fólki við demenssjúku ráð og vegleiðing um hjálpartól. Samstarv við avvarðandi er ofta fortreytin fyri at fólk við demenssjúku kunnu taka ímóti ráðum og vegleiðing fyri at kunna gagnnýta hjálpartólini til fulnar.

Dagtilboð
Samskiparin ráðgevur og vegleiðir um at søkja um **dagtilboð**, serliga tá ið borgarin onki tilknýti hevur til arbeiðsmarknaðin. Á dagtilboðnum er fakligur kontaktpersónur, og dagtilboðið verður veitt í fleiri sniðum, ið valdast um tørvin hjá borgaranum:

- CST bólkar (kognitiv stimulatión terapi) 2 ferð um vikuna 8 vikur hvørja ferð, ið kann vera bæði um dagin og um kvøldið. Hevur til endamáls at seinka gongdini av demenssjúkuni. (Fleiri, sum ganga í CST bólki, ganga ikki í vanligum dagtilboði)
- Vanligt dagtilboð í Dagtilhaldinum á Glyvrum gerandisdagar í dagtímum við koyring aftur og fram frá heiminum
- Dagtilboð í heiminum hjá demenssjúkum borgarum, tá ið vanligt dagtilboð er roynt, men ikki er eydnast nøktandi. Tá er vanligt, at starvsfólk frá dagtilhaldinum vitja borgarar í heiminum og skipa fyri ymiskum tiltøkum saman við borgaranum, sum t.d. svimjing o.a. Samstundis verður arbeitt við at fáa borgaran aftur í vanliga dagtilboðið.
- Dagtilboð í dagtímunum í vikuskiftum í Dagtilhaldinum á Glyvrum, stundum leygardag ella sunnudag, stundum bæði leygardag og sunnudag, (talan er um borgarar, sum hava svera demenssjúku, har eldraøki ikki kann veita umlætting/búpláss)
- Dagtilboð á Dagtilhaldinum á Glyvrum eftir kl 17 gerandisdagar og út á kvøldið til umleið kl 19, har Almannaverkið veitir hølir í Dagtilhaldinum á Glyvrum, og avvarðandi kommuna veitir starvsfólkaorku, (talan er um borgarar, sum hava svera demenssjúku, har kommuna ikki kann veita umlætting/búpláss)

Umlætting:
So hvørt sum demenssjúkan versnar, vísur tørvurin seg eisini á **umlætting**. Tað er ein sannroynd, at tørvurin á **búplássi** ofta vísur seg samstundis, sum tørvurin á umlætting stingur seg upp, og tá yngri demenssjúkir borgarar ofta fáa tørv á búplássi nokkso stutt eftir, at tørvur á umlætting hevur víst seg, hevur Almannaverkið mett tað vera skilagott at samstarva við kommunur um at keypa umlætting. Samskiparin hevur tá ofta frammanundan fingið í lag samstarv við avvarðandi kommunu, og er tað annars arbeiðsuppgávan hjá samskiparanum at samstarva við allar kommunur kring landið, m.a. um keyp av umlætting.

Kommunala økið í dag
Kommunurnar hava skipað seg í 7 samstarvsøkir, og so er Tórshavnar kommuna fyri seg. Talan er sostatt um 8 eldraøkir.

1. Tórshavnar Kommuna
2. Roðin (Nes, Sjóvar og Runavíkar kommunur)
3. VEKS (Vestmanna, Eiðis, Kvívíkar og Sunda kommunur).
4. Vesturvón (Kommunurnar í Vágum)
5. Nánd (Eystur og Fuglafjarðar kommunur)
6. NBH – Norðoya Bú- og Heimatænasta (Kommunurnar í Norðoyggjum)
7. Økistænastan (Kommunurnar í Sandoy og Skúvoy)
8. BHS – Bú- og Heimatænastan í Suðuroy (Kommunurnar í Suðuroynni)

Niðanfyri sæst yvirlit yvir tilboð og tænastur, sum eldraøkini í dag veita demenssjúkum borgarum yvir fólkapensjónsaldur.

	TK	VEKS	Roðin	Nánd	NBH	Vesturvón	Økistænasta	BHS
Kommunalir demenssamskiparar	X	X	X	X	X	X	X	X
Kontaktpersónaskipan	X		X	X	X	X	X	
Fleksibul ansing í heiminum*	X		X	X	X			
Búpláss – demenspláss	X	X	X	X	X	X	X	X
Stutttíðarpláss/umlætting	X	X	X	X	X	X	X	X
Vikuskiftisumlætting	X		X	X	X			
Koyritænasta	X	X	X	X	X	X	X	X
Dagtilboð	X	X	X	X	X	X	X	X
Kvøldtilboð	X		X	X	X			
Mattænasta	X	X	X	X	X	X	X	X
Venjingartilboð	X	X	X	X	X	X	X	X
Samrøðubólkar til borgarar og avarðandi	Á**		X	X	X	X		X
CST- bólkur	Á**		X	X		Á**		X

* Tá avvarðandi skulu í brúdleyp, føðingardag, kvøldskúla og líknandi
**Ávegis – arbeitt verður við at seta hesa tænastu í verk

1.3. Endamálið við uppskotinum

Samanumtikið verður mett, at tað er tørvur á at skipa tænastuna betur.

Høvuðsendamálið við uppskotinum er at tryggja, at borgarar við demenssjúku frameftir ikki detta niður ímillum skipanir hjá landinum og kommununum. Endamálið við uppskotinum er sostatt at fáa greiðu á ábyrgdini av fólki undir fólkapensjónsaldur við demenssjúku, og fáa skipanina so smidliga sum gjørligt fyri hesar borgarar og teirra avvarðandi. Við tað at eldraøkið fær ábyrgdina av at veita tænastuna, er tilboðið tættari at borgarunum. Hetta er eisini í samsvari við upprunaliga endamálið við at leggja eldraøkið til kommunurnar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýskipanin í hesum uppskoti fevnir um, at øll tænasta til fólk við demenssjúku verður savnað á einum stað. Harvið verður tænastan tættari borgaranum, eitt faklig umhvørvi verður ment á einum stað, ábyrgdarbýtið verður greitt, og tað slepst undan dupultfunktiónum á hesum øki.

Í sambandi við at geva kommununum ábyrgdina av tí samlaða demensøkinum, verða tað nakrar uppgávur, har mett verður, at tær framhaldandi verða skipaðar undir Almannaverkinum.

Almannaverkið fer framhaldandi at hava ábyrgdina av at veita hjálpartól til øll fólk við demenssjúku, sum ikki búgva á einum sambýli ella ellis- og røktarheimi hjá kommununum.

Harumframt fer uppgávan við alkoholdemens eisini at liggja eftir hjá Almannaverkinum. Orsøkin er, at alkoholdemens ikki er ein sjúka sum í sjálvum sær stendur við og versnar.

Tænasturnar, sum kommunurnar frameftir veita til fólk við demenssjúku eru somu tænastur, sum fólkapensjónistar fáa frá kommununum sambært lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Samlað sæð verður tað mett, at hetta er ein góð loysn fyri øll, sum fáa staðfest demens, eins og at samlaða tænastan til hesar borgarar og teirra avvarðandi verður betri.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið varð lagt alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri tann 15. september 2025.

Harumframt fingu hesi uppskotið til hoyringar:
Fíggjarmálaráðið
Heilsumálaráðið, undir hesum Demensklinikkin á Landssjúkrahúsinum
Kommunufelagið, undir hesum eldraøkini
MEGD
Alzheimerfelagið
Landsfelag Pensjónista
Heilsuhjálparafelag Føroya
Heilsurøktarafelagið
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Føroya Pedagogfelag

Psykiatriski depilin/Demensklinikkin á Landssjúkrahúsinum, Kommunufelagið, MEGD, Alzheimerfelagið, Heilsuhjálparafelag Føroya, Javni og Heilsumálaráðið hava sent Almanna- og mentamálaráðnum viðmerkingar til lógaruppskotið.

Javni tekur undir við at savna ábyrgdina fyri dagtilboð og umlætting til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur, tí hetta kann gera skipanina greiðari og tryggja, at færri detta niður ímillum land og kommunu. Javni vísir á, at tað er ógreitt, um fólk á stovnum fáa somu atgongd til dagtilboð, endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing sum heimabúgvandi.

Almanna- og mentamálaráðið viðmerkir til hetta, at tá tað snýr seg um dagtilboð, endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing, fevnir lógin um heimatænastu, eldrarøkt v.m. bert um borgarar í fólkapensjónsaldri. Men við hesum lógaruppskotinum skulu borgarar undir fólkapensjónsaldur við demenssjúkusjúku nú eisini verða fevndir av hesum tilboðum. Borgarar, sum í dag búgva hjá Almannaverkinum fáa tænastu sambært lógini um almannatrygd og tænastur.

Almanna- og mentamálaráðið metir samanumtikið ikki, at viðmerkingarnar frá Javna geva orsøk til at gera broytingar í lógaruppskotinum.

Heilsuhjálparafelag Føroya tekur undir við uppskotinum og metir tað vera gott fyri demensøkið, at tænastan verður savnað undir kommununum. Felagið vísir á, at tað metir, at hægri játtan eigur at fylgja við.

Almanna- og mentamálaráðið vísir á, at landið og kommunurnar eru samd um fíggingina, og metir samanumtikið ikki, at viðmerkingar frá Heilsuhjálparafelag Føroya geva orsøk til at gera broytingar í lógaruppskotinum.

Kommunufelagið tekur undir við uppskotinum og vísir á, at lógaruppskotið er úrslitið av einari jaligari tilgongd, sum Kommunufelagið hevur fingið høvi til at luttaka í longu frá byrjan og til endaliga uppskotið.

Kommunufelagið vísir á nøkur viðurskifti í lógini, sum eiga at verða broytt um somu leið:

- Heitið á lógini
- Ansingarsamsýning
- Orð sum eldraráð og eldrasambýli eiga at verða broytt, tí tænastan nú skal veitast til ein breiðari bólk av fólki enn bara eldri
- Í sambandi við eftirlit eigur lógin at verða broytt soleiðis, at skjøl, sum skulu nýtast til eftirlit, framhaldandi vera innanhýsis skjøl
- Fyrisitingarligar avgerðir tung byrða hjá eldraøkjunum – ynskja at avgerðirnar ikki skulu verða fyrisitingarligar, men líka sum í sjúkrahúsverkinum...

Almanna- og mentamálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at tey viðurskiftini, sum Kommunufelagið vísir á, sum eiga at verða broytt, ikki hava verið viðgjørd í sambandi við arbeiðið at leggja demensøkið til kommunurnar. Almanna- og mentamálaráðið er av teirri fatan, at talan er um rættiliga rúgvusmiklar broytingar, sum Kommunufelagið ynskir at broyta, og at nakrar av broytingunum krevja eina drúgvari viðgerð, áðrenn farast kann undir at fremja hesar. Av hesi orsøk verða tilmæltu broytingarnar frá Kommunufelagnum ikki tiknar við í lógaruppskotinum.

Alzheimerfelagið tekur undir við, at ábyrgdin av at veita tænastur og tilboð til fólk við demenssjúku, sum eru undir fólkapensjónsaldur, verður flutt til kommunurnar.

Alzheimerfelagið mælir tó til ávísar broytingar í lógaruppskotinum. Í § 10, stk. 1 verður mælt til, at orðið tænastur verður broytt til heildartænastur og at tað í § 10, stk. 2 verður ein serlig áseting um tilboð til borgarar við demenssjúku. Endamálið við broytingini er, at borgarar við demenssjúku fáa eitt samanhangandi heildartilboð heldur enn sundurpettaðar tænastur. Somuleiðis mælir felagið til broytingar í orðingini í § 10 a, stk. 1 um endurvenjing, at endamálið við at broyta orðingina er, at endurvenjingin fylgir einum ætlaðum leisti, heldur enn at verða veitt sum eitt sundurpettað tilboð og at borgarin kann verða virkin í egnum lívi óansæð bústað.

Harumframt verður mælt til, at tað allastaðni í lógartekstinum har tað stendur, at "kommunurnar veita", skuldi staðið "kommunurnar skulu veita..."
Mælt verður eisini til, at orðið demens verður broytt til demenssjúka í øllum lógaruppskotinum.
Harumframt mælir Alzheimersfelagið til, at tað skal framganga, at "kommunan skal tryggja kommunala demenssamskipan til borgarar við demens, og/ella borgarar við tekin upp á demenssjúku."

Almanna- og mentamálaráðið vísir á, at Alzheimerfelagið ynskir nakrar broytingar í allari lógini um, hvat kommunurnar skulu og kunnu veita. Hetta hevur ikki verið partur av arbeiðinum at gera lógaruppskotið og hevur tí ikki verið umrøtt við kommunurnar. Tilmælið frá Alzheimersfelagnum verður tí ikki tikið við í lógaruppskotið í hesum umfari.
Almanna- og mentamálaráðið hevur tikið viðmerkingina um at broyta orðið "demens" til "demenssjúku" til eftirtektar, og er hetta broytt í lógaruppskotinum.

Lógin um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ein rammulóg, har kommunurnar sjálvar áseta tænastustøðið, sum tær veita. Almanna- og mentamálaráðið fer tí ikki í lógaruppskotinum at áseta, hvørjar tænastur fólk við demenssjúku skulu hava frá kommununum. Tí eru hinar viðmerkingarnar ikki tiknar til eftirtektar.

MEGD tekur undir við uppskotinum og fegnast um, at áheitanir frá m.a. Alzheimerfelagnum eru tiknar í álvara.

MEGD vísir á, at tað hevði verið ynskiligt at fingið orðað ein demenspolitikk fyri Føroyar, sum millum annað hevur til endamáls at seta í verk og samskipa ítøkilig langtíðar átøk, sum kunnu vera við til at fyribyrgja, at føroyingar verða raktir av demens. MEGD vísir eisini á, at í einum demenspolitikki fyri Føroyar eigur atlit eisini at verða tikið at fólki, ið bera brek, sum eru í øktum vanda fyri at fáa demens tíðliga í lívinum.

Harumframt mælir MEGD til, at ein eftirmeting verður gjørd, innan rímiliga tíð, av hvussu tað gongur við dagtilboði og umlætting til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur, tá ið kommunurnar hava havt hesa týðandi ábyrgd í nøkur ár.

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at viðmerkingar hjá MEGD geva orsøk til at gera nakrar ítøkiligar broytingar í lógaruppskotinum. Tó kann Almanna- og mentamálaráðið taka undir við, at ein demenspolitikkur fyri Føroyar eigur at verða gjørdur, men tað er ikki partur av hesum lógaruppskotinum.

Psykiatriski depilin metir, at tað er ein skilagóð loysn at savna demensøkið hjá kommununum, eins og víst hevur verið á frá ymsum pørtum ígjøgnum fleiri ár. Psykiatriski depilin undrast á, hví fólk við alkoholdemensi ikki eru partur av hesum lógaruppskoti. Psykiatriski depilin heldur ikki, at hugtakið "alkoholdemensur" er serliga væl definerað, og ofta er talan um eina blanding av alkohol tongdum demensi og øðrum demensi og tí hava hesi fólk ofta tørv á teimum tænastum, sum finnast á demensøkinum. Mælt verður tí til, at alkoholdemensur eisini verður fevndur av lógini.

Heilsumálaráðið tekur undir við viðmerkingunum hjá Psykiatriska deplinum og hevur ikki nakað at leggja afturat.

Almanna- og mentamálaráðið hevur viðgjørt spurningin um alkoholdemens í sambandi við arbeiðið við at leggja demensøkið til kommunurnar. Tá bleiv tað avgjørt, at hesin parturin skal liggja eftir hjá landinum. Talan er tó um ein spurning, sum kann takast upp aftur við kommunurnar seinni, um tað vísir seg, at persónar við alkoholdemensi hava tørv á tænastunum, sum kommunurnar veita.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið og kommunurnar. Yvirskipað merkir umskipanin, at játtanin, sum Almannaverkið hevur í dag, verður flutt kommunum eftir einum fíggjarleisti.

Niðanfyri sæst yvirlit yvir kostnaðin fyri dagtilboð og umlætting til fólk við demenssjúku seinastu trý árini, og hvat Almannaverkið væntar, kostnaðurin er í 2025.

Kostnaður fyri tænastu til demens	R2022	R2023	R2024	Framskr.2025
Dagtilboðið Skotarók	1.650	1.745	1.597	2.002
Dagtilboðið fyri demens, Glyvrar	1.873	1.950	2.112	2.381
Keyp frá kommunum (umlætting)	285	250	200	217
Í alt	3.808	3.945	3.909	4.600

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri kommununar/eldraøkini, men mett verður at tað eru smávegis avleiðingar, við tað at talan er um fá mál pr. eldrasamstarv.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið fær ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Demensøkið verður skipað hjá einum geira, og hevur uppskotið sostatt jaligar avleiðingar fyri fólk við demenssjúku undir 67 ár.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er í samsvari við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Hetta uppskotið skal forða fyri, at fólk detta niður ímillum skipanir.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógin hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting og sektir, og lógaruppskotið ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið ásetir ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið ásetir ikki gjald til ávís endamál.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Endamálið við broytingini er at staðfesta, at kommunurnar hava ábyrgdina av at veita borgarum, undir fólkapensjónsaldur, við demenssjúku tilboð og tænastur sambært lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Til § 1, nr. 1
(§ 10, stk. 1)
Ásetingin er tann sama, men heimildin hjá kommununum verður víðkað soleiðis, at kommunurnar eisini veita tænastur til borgarar undir fólkapensjónsaldur, ið hava demenssjúku.

Til § 1, nr. 2
(§ 10 a, stk. 1)
Ásetingin er tann sama, men heimildin hjá kommununum verður víðkað soleiðis, at kommunurnar eisini veita endurvenjing til fólk undir fólkapensjónsaldur við demenssjúku.

Til § 1, nr. 3
(§ 10 b, stk. 1)
Ásetingin er tann sama, men heimildin hjá kommununum verður víðkað soleiðis, at kommunurnar eisini veita viðlíkahaldsvenjing til fólk, undir fólkapensjónsaldur, við demenssjúku.

Til § 1, nr. 4
(§ 10 b, stk. 2)
Ásetingin er tann sama, men ístaðin fyri at víst verður til fólkapensjónistar verður nú víst til borgaran, sum sambært stk.1 er fevndur av persónsbólkinum, sum kann fáa viðlíkahaldsvenjing.

Til § 1, nr.
(§ 13, stk. 1)
Ásetingin er tann sama, men heimildin hjá kommununum verður víðkað soleiðis, at kommunurnar eisini kunnu seta bústaðir á stovn til fólk undir fólkapensjónsaldur við demenssjúku.

Til § 1, nr. 6
(§ 14, stk. 1)
Ásetingin er tann sama, men fevnir nú eisini um fólk undir fólkapensjónsaldur við demenssjúku.

Til § 2
Gildiskoman er ásett til 1. januar 2026.

Almanna- og mentamálaráðið, 4. november 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Eyðun M. Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Alzheimerfelagið
Fylgiskjal 3: Javni
Fylgiskjal 4: Heilsuhjálparafelag Føroya
Fylgiskjal 5: Psykiatriski depilin/Demensklinikkin
Fylgiskjal 6: Heilsumálaráðið
Fylgiskjal 7: Kommunufelagið
Fylgiskjal 8: MEGD